## FØÐINGAR



Olivia fekk eina lítlasystir tann 14.1.02 og hon eitur Annika. Foreldrini eru Stig Persson og Tórunn Asgeirsdóttir.

12. okt. fingu Elin Ewaldsdóttir Nielsen og William Hjelm Nielsen, Allerød, eina dóttur. Hon var 50 cm og vigaði 3300 gr.

19. okt. fingu Randi Ellingsgaard og Martin Frederiksen, Herfølge, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4080 gr.

22. okt. fingu Elken Matras og Kenneth Neshamar, Fuglafjørður, eina dóttur, hon var 53 cm. og vigaði 3600 gr.

23. okt. fingu Miriam og Magnus Jensen, Hov, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3400 gr.

24. okt. fingu Kristín Baldvinsdóttir og Rókur Tummasarson, Argir, tvíburar – gentu og drong. Gentan var 48 cm. og vigaði 2300 gr. og drongurin var 51 cm. og vigaði 2730 gr.

25. okt. fingu Gunrid Reinert og Remy Hjaltalin á Kamarinum, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4450 gr.

30. okt. fingu Heidi og Uni Nón, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3800 gr.

30. okt. fingu Arithra Nandy og Srikanya Nandi, Yviri við Strond 21, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3550 gr.

30. okt. fingu Eyðgerð og Jógvan Kruse, Hósvík, eina dóttur. Hon var 48 cm. og vigaði 3050 gr.

31. okt. fingu Annika Niclasen og Peter Leon Lorenzen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3400 gr.

31. okt. fingu Ella Olsen og Brian Pedersen, Nakskov, ein son, ið eitur Peder Brianson Olsen. Hann var 55 cm. og vigaði 3500 gr.

## ANDLÁT

**23.10**
Katrina Johannesen á Skála, 80 ár.

**25.10**
Ásvør Ranghamar, Norðagøta, 68 ár.
Reidar Samuelsen, Tórshavn, 74 ár.
Jens Edvard Jensen av Hellunum, 85 ár.

**27.10**
Einar Mohr ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Ánunum, 79 ár.
Rigmor Skála, Tórshavn, 85 ár.
Anna Dalsgaard, Tórshavn, 64 ár.
Richard Lamhauge, Lamba, 81 ár

**28.10**
Hans Ottosen, Haldórsvík, 64 ár
Emmely Nolsøe, Tórshavn, 84 ár

**30.10**
Elisa Hammer, fødd Ellingsgaard, av Eiði, 87 ár

## 75 ÁR

Týsdagin 29. oktober fylti Helga Strømsten, Norðragøta, 75 ár. Dagurin verður hildin í dag leygardagin 2. nov. í Gøtubrá í Gøtugjógv kl. 19.00.

## TILTØK

**Allahalganna sunnudagur**
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen – Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg.,
*Fámjin:* kl. 17, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur í báðum støðum fyri Einkjugrunnin
*Leiti:* kl. 12, altarg., Marianne Telling
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
*Kl. 16.00*
Minningargudstænasta fyri deyð børn, Inga Poulsen Dam
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11, altargongd, Sverri Steinhólm og Jens Lombert, KFS-skrivari
*Nólsoy:* kl. 12.00, Sonja Klein. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
*Kaldbak:* kl. 12.00 Henning Nielsen, altarg. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12.00 Messa (minningarhald)
*Funningur:* kl. 17.00 Messa (minningarhald), Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Sørvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Saksun:* kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
*Hósvík:* kl. 12.00 Marjun Bæk.
*Í Vestmanna kirkju gongur talvan fyri Einkjugrunn Føroya*
*Viðareiði:* kl. 12.00 Elsa Funding. Í Norðoya eystara prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl.10,
*Árnafjørður:* kl. 12, altarg., Niels Pauli DAnielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, Talvan gongur á middegi fyri Hjálpargrunnin
*kl. 16:* minningargudst. fyri pinkubarnadeyð. Hans Eiler Hammer
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Hov:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Ramussen
*Fuglafjørður:* kl. 12, Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Skúvoy:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen.
*Broytt kirkjutíð í Vágum:*
Komandi sunnudag (3. nov.) verður farið í kirkju kl. 12.00 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø

**Aglow Tórshavn**
Aglowdagur verður leygardagin 9. nov. kl. 12.00 á Sjómansheiminum. Skráin: Døgurði, lovsangur og undirvísing. Allar kvinnur eru vælkomnar. Tilmeld. í seinasta lagi hóskvøldið 7. nov. Tiltakið er ókeypis.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Møti sunnudagin kl. 11.00 og 18.00, Steindor Hjaltalin, Torbjørn Lágadal og fleiri luttaka. Sunnudagsskúli kl. 14.00 og børn kl. 17.30. Øll vælkomin.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.
Týsdagin kl. 17.00 og 20.00 Hornvenjing.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti har møtirøðin heldur áfram við evninum: Ábraham – trúarhetjan.
Mikukvøldið kl. 20.00 byrja Samfelagsmøtini við bønarhaldi.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta, Jóna Jóhannesen, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti, Gunnar Nielsen talar. Heimasíða
www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa við Biskup Lukas de Hovre í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v. Jens Lomberg frá KFS.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Lovsangsmøti.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti við Alex O'Campo, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Lovsangsmøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Jústinus Ejdesgaard.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ innsetan av tænastu, Jón Miðberg talar.
Mánadagin kl. 19.00 andakt á Eldrasambýlinum v/ Magnus Paula Johannesen.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Edelborg Petersen, Haldarsvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Norðskála kirkja**
Kirkju- og missiónsvikan byrjar í morgin – allahalganna sunnudag – við skriftamáli kl. 11.40, messu kl. 12.00 og heldur fram alla vikuna við gudstænastum og møtum.
Mánakvøldið verður katekismusgudstænasta kl. 20.00.
Evni: Konfirmatións/ferming.

**Sjómanskvinnuringurin**
í Runavík kemur saman á sjómansheiminum mánakvøldið kl. 19.30. Mint verður á jólapakkarnar til sjómennirnar. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi, Margeir Toftegaard luttekur.
Leygardagin kl. 17.30-19.30 juniorarbeiði fyri børn 3.-7. fl.
Leygarkvøldið einki opið hús vegna felags lovsongsvikuskiftið í Filadelfia, bussur fer frá Kelduni.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti við Reimund Langgaard. Lovsongsbólkur luttekur. Aftaná verður drekka og hugnaløta. Innsamling til húsið.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00. Frits Thomsen verður við. Øll eru vælkomin.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20.00 Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime: 1. Kor. 12 v. Peter O. K. Olofson.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti og kl. 21.00 Ungdómsmøti.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»So satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær!«*
*Matt. 25,40*

Vit siga, at Gud er kærleiki, og tað er hann, ófatiligur kærleiki. Vit kunna og megna ikki at grunda út dýpið av kærleika hansara. Ja, hesin kærleiki rakk út á Golgata, hann læt lív av kærleika til heimin. Og hesin kærleiki er til øll, sum vilja hava lut í honum. Jesu deyði og uppreisn eru vitni um Guds kærleika til okkum menniskju. Men vit eiga at siga eitt annað, og tað er, at heimurin, vit liva í, tystir eftir kærleika og tolsemi. Skulu vit sum kristin verða trúverdug, so mega vit eisini liva kærleikans lív millum medmenniskju okkara. Vit liva ikki á himni enn, vit liva her og nú. Og her og nú skulu vit bera Guds kærleika víðari til næstan.

Menniskju vilja fáa lut í Guds náði og kærleika.

Tað er onkur, sum hevur sagt, at vit eru Guds hendur í heiminum. Vit eru sett inn í henda heim, fyri at vit skulu virka her í trúskapi. Vit skulu liva her og nú og ikki gloyma foldarlív, uppgávur og skyldur okkara.

Vit tæna Gudi við at tæna lívinum og næstanum.

Tað er trúskap ella ótrúskap okkara í hesum lívi, sum vit skulu svara fyri á dómadegi. Gerðir okkara fylgja okkum, so leingi vit liva.

Uttanum lívið og næstan sleppa vit ikki. Gerningar okkara eru okkara vitnisburður.

Gud krevur av okkum kristnu kærleika, tolsemi og rættvísi. Hann krevur av okkum, at vit eru trúverdug og sonn. Her og nú verður opinberað, hvørjum harra vit tæna, Gudi ella mammon.

Kennir tú títt kall? Ja, men liva so lívið í tænastu fyri øðrum!

Amen

**David Johannesen**



## TILTØK

**Lívsins Orð**
Tim 5 verður í dag kl. 17.30. Barnamøti verður í dag kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Dávid Bech.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Magnus og Miu Simonsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Alpha skeið og bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 15.00 Familjumøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Leif og Susanne Madsen, kl. 18.00 Evangeliskt møti v/ Leif og Susanne Madsen.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongur. Kl. 18.00 Møti. Innsavnan til húsið.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Alment møti verður í Sólarris í Húsavík leygardagin kl. 20.00 við vitjan úr Kenya av trúboðaraparinum Susanne og Leif Madsen. Allar kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Prestagarðurin á Tvøroyri**
Eldrasamkoma verður í prestagarðinum mánadagin 2. nov. frá kl. 16.00 til 17.30. Um onkur ikki veit sær flutning, ber til at siga frá í prestagarðinum á tlf. 371047.

Øll áhugað eru vælkomin at vera við.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygardagin kl. 20.00 í Café One Way, allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Árasølan leygardagin er útsett til mánadagin kl. 19.00 í Framtíðini.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti, Elisabeth og Sámal Jákup Joensen luttaka. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnudagin fara børnini í kirkju kl. 11.00, kl. 18.00 Møti við N. J. Nielsen, trúboðara. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyahúsið**
**Sunnudagin 10. nov.** kl. 17.00 verður evangeliskt møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Andrew Berghamar kemur at tala. Á skránni verður eisini felagssangur, sangframførsla og annað. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 4. nov.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 5. nov.:*
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 **Vit syngja saman við gestum frá Føroya Fólkaháskúla** – Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 **Skúlabarnaferðin 1939**. Helena Nattestad og Halda Olsen
*Mikudagin 6. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 7. nov.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17.00 **Virka til jóla**.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 8. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 13-17 Opið hús
**Vitjan av pensioneraðum sjúkrarøktarfrøðingum.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 2. nov.: Skála, tlf. 44 14 90
Sunnudagin 3. nov.: Eiði, tlf. 42 30 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 16. november kl. 13.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Tóra Højgaard, Toftir og Hans Toftegaard, Fuglafjørður. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá seinast 2. november á tlf. 448222 ella 444237.


